# Lóg fyri TVØROYRAR BYGDA- OG SJOVINNUSAVN.

1. grein. Tvøroyrar Fornminnisfelag setur á stovn sjálvsognarstovnin TVØROYRAR BYGDA- OG SJOVINNUSAVN.

2. grein. Savnið er ein siðsøguligur innsavningar-, varðveitingar- og upplýsingarstovnur fyri bygdirnar í Tvøroyrar Kommunu.

Uppgávur savnsins eru:

- at fremja endamál Tvøroyrar Fornminnisfelags
- at savna og skráseta forngripir og annað siðsøguligt tilfar
- at seta upp siðsøguligar framsýningar
- at reka siðsøguligt varðveitingar- og upplýsingarvirksemi annars

Í virksemi sínum fer savnið at leggja serstakan dent á menningina av fiskivinnusamfelagnum.

3. grein. Stjórn savnsins hevur 3 limir. 2 limir úr nevnd Tvøroyrar Fornminnisfelags og 3. verður valdur millum limir í Tvøroyrar Forminnisfelag ella úr Tvøroyrar Býráð ( helst Mentunarnevndini).

Stjórnin stendur aðalfundi Tvøroyrar Fornminnisfelags til svars fyri ognum og rakstri savnsins.

Stjórnin skipar seg sjálv við formanni, kassameistara og skrivara

4. grein. Roknskaparár savnsins er kalendarárið. Grannskoðaður roknskapur skal fyrileggjast Tvøroyrar Fornminnisfelag á ársaðalfundi.

5. grein. Gevst savnið verður farið fram eftir løgtingslóg nr.17 frá 9. mai 1972 við seinni broytingum um bygdasøvn og mentunar søguligt virksemi.

Soleiðis samtykt á ársaðalfundi í Tvøroyrar Fornminnisfelag tann

1. september 1992.

N E V N D I N :

Johannes Ennið   Tórtur Ennin

Einar Hansen

**AVRIT**

Góðkend.

FØROYA LANDSSTYRI, 15. november 1993

landsstýrismaður